# Fiskivinnuhavnin í søguna

Tað bvar tann tíð, tá Esbjerg var tann stóri fiskivinnubýurin í Esbjerg. Men so minkaðu kvoturnar, og tað gjørdi, at skipini fækkaðu, og í dag eru bara nøkur fá fiskiskip eftir í býnum. Hendan gongdin sæst eisini á tí stóra havnarlagnum, tí nú er´tað ikki fiskur, men oljuútbúnaður og annar farmur, sum fyllir havnina. Í hesum døgum fer fiskivinnuhavnin so í søguna, tí nú hevur býráðið samtykt at fylla hana við sandi og betong. Arbeiðið verður ætlandi liðugt um eitt ár, og tá skal økið brúkast sum vinnuøki. Talan verður um 40.000 fermetrar, og sambært býráðnum hava fleiri fyritøkur biðið um at sleppa at leiga burtur av økinum.



# Fundast um veðurlagið

Í dag hittast umboð fyri fleiri lond til fundar í Washington, har tey fara at umrøða ymsar spurningar í sambandi við umhvørvið og veðurlagsbroytingar. Tað er Barrack Obama, sum hevur sent fundarboð, og endamálið er at samskipa ymsar áskoðanir fyri at gera tað møguligt at fáa eina endaliga semju á veðurlagsráðstevnuni, sum verður í Keypmannahavn í desember. Millum luttakararnar á fundinum í Washington eru USA, Bretland, Týskland, Russland, Kina, Japan og umboð fyri ST og ES. Danmark er eisini umboðað, tí landið er vertur fyri altjóða ráðstevnuni seinni í ár.

# Sól á Eiði



*Ólavur Larsen og Marita á Høgaryggi hugnaði sær ófført, hóast tey gjørdu nøkur mistøk*



*Oddur Hentze er nýggjur leiðari í Norðljómi. Hann undirvísir eisini sjálvur á skúlanum, og her stjórnar hann verkinum Sól hjá Sunnleifi Rasmussen*



*Jógvan K. Mørkøre og Petur Martin Ejdesgaard greiddu frá tónleiki á Eiði í 1937*



*Rebekka Joensen frá Norðskála las brot úr yrkingum hjá Hans Andreas Djurhuus og Christian Matras, sum Sunnleif Rasmussen hevði tikið við í verkið Sól*



*Niels Midjord úr Fuglafirði er annar av undirvísarunum hjá ungu dreingjunum í gittarspæli í musikskúlanum*

**Flaggdagin hátíðarhelt Norðljómur, musikskúlin í Norðureysturoy og Norðurstreymoy, 20 ára dag. Hetta varð millum annað gjørt við at framføra nýggja verkið »Sól«, sum Sunnleif Rasmussen hevur skrivað til høvið**

HÁTÍÐARHALD
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*
*Myndir: Sofus D. Johannesen*

Tað var lagt upp til stórt hátíðarhald á Eiði leygardagin, tá Norðljómur helt 20 ára føðingardag. Heilt nógvir næmingar eru við í musikskúlanum, sum Oddur Hentze er á odda fyri. Tey flestu av hesum spældu áðrenn hæddarpunktið, sum var, tá nýggja verkið »Sól« hjá Sunnleifi Rasmussen varð frumframført.

– Tá eg varð biðin um at skriva eitt verk til hetta, segði eg beinanvegin ja, tí musikskúlin og tónleikur er ein sera týdningarmikil partur av lívinum, segði Sunnleif Rasmussen, somuleiðis greiddi hann frá, at hann hevði valt sólina, tí hon røkkur sálini.

– Eg havi skrivað verkið soleiðis, at næmingarnir tónleikaliga sleppa at gera nakað, tey vanliga ikki sleppa. Tey sleppa nevniliga at lata vera við at spæla júst tað sama, sum øll hini gera, greiddi hann frá.

Men hann hevði eisini yvirskot at rósa næmingunum í musikskúlanum.

– Eg rokni eisini við, at næstu ferð tit hava hátíðarhald, so verður tað ein lokalur maður, sum skrivar verkið. Ólavur Larsen er nevniliga eitt tað størsta talentið at skriva tónleik, eg havi sæð í Føroyum í longri tíð, segði hann um unga oyrarmannin, sum spælir klarinett og klaver, umframt at skriva tónleik.

Verkið hevur fingið íblástur úr yrkingum hjá Christian Matras og Hans Andreas Djurhuus, og tá tað varð framført var ongin ivi um, at Sunnleif Rasmussen hevur skrivað.

Undir framførsluni vóru brot eisini lisin úr yrkingum hjá Christian Matras og Hans Andreas Djurhuus. Hetta gjørdi Rebekka Joensen frá Norðskála, og tað sýntist sum, at Sunnleif Rasmussen var sera væl nøgdur við tað, hann hoyrdi.

## 20 ára gamal

Norðljómur varð settur á stovn í 1988, og tað var Hans Erland í Brekkunum, sum var fyrsti formaðurin í felagnum. Hann hevur, síðan hann kom til Eiðis, verið sera virkin við tónleiki í bygdini, og tað skilst, at hann sjálvur fann upp á navnið til skúlan.

Seinastu 20 árini hava skiftandi fólk verið formenn í skúlanum, Súsanna Hammer hevur seinastu árini verið leiðari, men hon takkaði fyri seg seinasta dagin í 2008. Nú er Oddur Hentze, sum eisini er musikskúlalærari, leiðari í Norðljómi.

Næmingarnir koma fyrst og fremst úr Norðureysturoy og Norðurstreymoy, men tað eru eisini næmingar úr øðrum bygdum.

## Eldri tónleikari

Jógvan K. Mørkøre, mentanarleiðari á Eiði, varð fyrstur á skránni, har hann millum annað fekk 84 ára gamla Petur M. Ejdesgaard, ið spældi tónleik á Eiði 1. mai í 1937.

Petur M. Ejdesgaard greiddi millum annað frá, at teir spældu 1. mai, tí tá spældi mann ikki flaggdagin, tí tá var ongin tílíkur.

Sjálvur spældi Petur M. Ejdesgaard piccolo.

– Eg spældi piccolo. Og so í parantes, en meget lille fløjte, greiddi hann frá, stóð á eskjuni.

Tiltakið í høllini á Eiði hevur verið fyrireikað í eina tíð, og fekk víst, at Norðljómur hevur nógv at siga fyri tónleik í økinum.